Summar FESTIVALUR - har hittini hittast



FESTIVALTÍÐINDI við Ragnhild Ellingsgaard

# The Dreams spæla á Summar Festivalinum

**Fremsti føroyski rockbólkurin fer í august aftur á pallin á Summar Festivalinum, har seinasta framførslan var so minnilig, at hon var givin út á dvd í Danmark**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

The Dreams eru komnir langt uttanlands, og nú er bert spurningur um tíð, áðrenn føroyski rockbólkurin við basa í Danmark, røkkur enn longri út í heim. Áhugin fyri The Dreams er størri enn nakrantíð – bæði í Danmark og aðrastaðni kring Europa – og fyrstu úrslitini av tí eru farin at síggjast. Nú verður arbeitt miðvíst fram ímóti at fáa eitt altjóða gjøgnumbrot og við einum sáttmála, sum longu er komin í hús í Fraklandi, tykjast dreymarnir skjótt fara á flog.

Men The Dreams gloyma ikki Føroyar og Summar Festivalin, har teir hava spælt fleiri ferðir áður. Langt áðrenn The Dreams fekk gjøgnumbrotið í Danmark og samstundis gjørdist eitt stórt navn í føroyskum tónleiki, spældu teir á Summar Festivalinum. Potentiali í bólkinum var frá byrjan stórt, og tað er púra vist, at bólkurin hevur ikki rokkið sínari endastatión uttanfyri landoddarnar enn – og langt frá tí.

Í fjør spældu The Dreams eina fantastiska konsert á stóra palli á Summar Festivalinum, og konsertin eydnaðist so væl, at stórur partur av framførsluni varð givin út á dvd í Danmark og í Føroyum. Myndirnar vóru minniligar, og tónleikurin var framúr.

Og nú er greitt, at The Dreams spæla á Summar Festivalinum aftur í ár, har teir lova eina rimmar konsert til allar rockelskarar.





*Tað verður ein feit konsert við løgum, sum vit øll kenna, tá The Dreams aftur í ár koma á pallin hjá Summar Festivalinum*



## Túnatos

**Rebecca Joensen er 19 ár, lesandi og frá Klaksvík**

**1. Ætlar tú tær á SF í ár?**
*Ja, eg búgvi í Klaksvík, so eg ætli mær sjálvandi. SF er altíð hugnaligt og hoyrir til føroyska summarið.*

**2. Hvør hevur verið besta konsertin nakrantíð á SF?**
*Uttan iva Alphabeat í 2008!*

**3. Svevur tú í tjald ella í ordiligari song á SF?**
*Eg sovi míni egnu song! :)*

**4. Hvat hevur verið tín hugnaligasta uppliving á SF?**
*Tað hugnaligasta man nokk verða stemningurin á festivalinum, góður tónleikur og fitt fólk ;)*

**5. Hvat gleðir tú teg mest til á SF 2009?**
*uuhh… tað man nokk fara vera Robin Gibb..*

# DJ show á Summar Festivalinum

**Tveir av best umtóktu DJ'unum í Føroyum fara at undirhalda í Flagstjaldinum á Summar Festivalinum**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Summar Festivalurin kann bjóða eina ørgrynnu av livandi tónleik á palli, men møguleiki verður eisini at dansa til tónar, sum tveir av fremstu DJ'unum í Føroyum hava at bjóða.

Bæði leygarnáttina og sunnunáttina verður DJ show í Flagstjaldinum á Summar Festivalinum, og tað verða DJ Cool og DJ Tech, sum fara at standa fyri tónleikinum.

DJ Cool hevur ferðast land og ríkið runt sum plátuvendari. Hann hevur hitað stórar áhoyrarafjøldir upp til nøvn sum Nik & Jay, DJ Aligator, Sash, SOAP, Rene Diff og Anna David. DJ Cool var í nógv ár fastur DJ í Club 20, og nú er hann fastur fúsur á Eclipse og Rex í Havn.

DJ Tech er nógv umbiðin til tiltøk kring alt landið. Hann var í fleiri ár DJ í Club 20 og telist nú millum teir, sum standa fyri undirhaldinum á Rex og Eclipse í Havn.

DJ Cool og DJ Tech hava royndir í at fáa eina og hvørja áhoyrarafjøld at kóka, og tað fara teir eisini at gera mitt á nátt í Flags-tjaldinum á Summar Festivalinum.





*DJ Cool og DJ Tech lova at fáa Flagstjaldið upp at koyra í føroysku summarnáttini*